Tíðindi úr Føroyum tann 4. Juni 2014

Tíðindi til føroyingar uttanlanda stuðla av tí føroysku sjómanskirkjuni.

---

**Grikskir skipareiðarar gera flestu íløgurnar**
Grikkaland er ikki bert tann virknasta sjóferðslutjóðin, tá tað kemur til keyp og sølu av skipum. Griksku skipareiðararnir eru eisini teir, ið gera størstu íløgurnar í nýbyggingarsáttmálar. Síðani 2010 hava grikskir skipareiðarar gjørt nýbyggingarsáttmálar fyri tilsamans 51 miljardir dollarar og skugga sostatt fullkomuliga fyri londum sum Norra og Kina.
"Áhugin hjá griksku skipareiðarunum fyri nýbyggingarsáttmálum hevur hildið fram í 2014, har 73 nýggir sáttmálar til eitt virði av 4,3 miljardir dollarum eru undirskrivaðir. Orsakað av fokus á skipasegment av hægri virði fara teir framum Kina í virði, hóast teir tapa í samlaða talinum av sáttmálum í øllum árunum burtursæð frá 2013", sigur Peter Sand, greiningarstjóri hjá Bimco.
Kina hevur gjørt tilsamans 98 nýbyggingarsáttmálar í 2014. Í 2013 undirskrivaðu kinesiskir skipareiðarar 270 sáttmálar, meðan grikskir skipareiðarar komu heilt upp á 284.
Fyri norsku skipareiðararnar var 2012 tað týdningarmesta árið, og her vóru tað frálandaíløgurnar, ið gjørdu munin. Norra gjørdi hetta árið 133 nýggjar sáttmálar til eitt virði av 17,8 miljardir dollarum. Til samanberingarnar gjørdi Kina í 2010 643 sáttmálar til eitt virði av 17,3 miljardir dollarum.
"2012 var eitt slakt íløguár hjá øllum, tí tað var ávirkað av vánaligum vinnuligum marknaðarkorum á øllum teimum týdningarmestu shippingsegmentunum. Betri kor í 2013 gjørdu, at hugurin vendi aftur hjá íleggjarunum. 2014 hevur havt eina nógv slakari byrjan, men tignarstigið er óbroytt", sigur Peter Sand.
Kelda: Bimco
Antares.fo

---

**Boripallur kostar 42 miljardir krónur**
Ein framleiðslu- og goymslueind til oljuleiðina Goliat í Barentshavinum er vorðin seinkað frá koreansku skipasmiðjuni Hyundai Heavy Industries og er tí vorðin nógv dýrari enn ætlað. Kostnaðurin lendur á 45,9 miljardir norskum krónum (42 miljardir í donskum krónum), sum er nógv meira enn ætlaðu 28,6 miljardir norsku krónurnar.
"Loysnirnar á Goliat eru tillagaðar serliga til virksemi í Barentshavinum. Hetta hevur av fleiri orsøkum havt við sær eykaútreiðslur og kravt meiri tíð", sigur Andreas Wulff, samskiftisleiðari í norska orkufelagnum Eni.
Skipasmiðjan hevur millum annað verið noydd til at útskifta útgerð, ið ikki var góðkend til nýtslu í spreingivandamiklum umráðum á Goliat. Og harumframt hevur Eni fleiri ferðir verið noytt til at rinda fyri arbeiði, sum Hyundai ikki hevði førleika ella orku til.
Andreas Wulff er tó sannførdur um, at byggiverkætlanin hevði verið seinkað, sama hvør skipasmiðja hevði fingið uppgávuna. Hetta er nevniliga fyrsta oljuverkætlanin í Barentshavinum, og hetta er fyrstu ferð ein sýlindaraskapaður FPSO verður bygdur eftir Norsok-krøvunum.
Nýggju trygdarkrøvini Norsok verða kravd í Norra frá byrjanini av 2015.
Kelda: ing.dk
Antares.fo

---

**Vágbingar ætla at keypa skip til uppsjóvarveiðu**
Á middegi mánadagin kom danska nótaskipið Asbjørn Senior á Havnina úr Hirtshals. Og í morgun fór Asbjørn Senior til Kollafjarðar at liggja.
Ætlanin er at keypa skipið til Føroya at fiska uppsjóvarfisk.

P/f South Pelagic í Vági, sum eigur Grunnabarð, ið hevur royndarloyvi at fiska hvítingsbróðir til hálvan juli, hevur, sambært in.fo, arbeitt við at fáa Asbjørn Senior í føroyska flotan, og felagið hevur søkt um loyvi at fiska uppsjóvarfisk.
Hava stovnað nýtt partafelag
Í síðstu viku varð so nýtt partafelag stovnað í Vági, P/f Baglhólmur, við sama endamáli sum South Pelagic, millum annað at reka skip. Nevndarformaðurin í South Pelagic, Finnbjørn Poulsen, og stjórin, Aleksander Nordenskjold Vilhelm, stovnaðu Baglhólm, og teir eru ávikavist nevndarformaður og stjóri í tí felagnum eisini.
Aleksander N. Vilhelm hevur ongar viðmerkingar enn. Hann sigur, at eitt tíðindaskriv kemur seinni í dag. Asbjørn Senior er ikki keyptur enn, men tað er um tað lagið, skilst.
Grunnabarð fiskaði bæði makrel og sild í fjør. Thor keypti skipið, tí Thor hevði loyvi at fiska uppsjóvarfisk. Men nú eigur South Pelagic aftur Grunnabarð.
Kelda: KVF
Antares.fo

---

**Kreppan í Vinstraflokkinum – ein kreppa sum einans var í fjølmiðlunum?**
04.06.2014 - 06:48
Tað var ongantíð ein meiriluti av valfeløgunum hjá Danska Vinstraflokkinum sum kravdu at Lars Løkke fór frá og harafturat hevur hann alla tíðina havt ein stóran meiriluta millum fólkatingslimir hjá Vinstra og í sjálvari leiðsluni. Álíkavæl kalla flestu av stóru donsku miðlunum tað at Løkke ikki fór frá sum formaður fyri eitt Comback?
Og tað verður gjørt tí meginparturin av søguni bygdu á metingar av støðuni í Vinstraflokkinum eftir vánaliga val úrslitið. Sjálv skandalu-søgan í Ekstrablaðnum var ikki nakað sum Lars Løkke hevði tikið sær av órøttum ella stolið sær til, men vóru útreiðslur sum leiðslan í flokkinum hevði sagt ja til at rinda fyri formannin.
Tað var rein spekulatión hjá miðlafólkum tá 2 News (Fyens Stiftstidende, Politiken) við døgurðatíð í gjár "váttaðu" yvir fyri danska fólkinum at Lars Løkke Rasmussen fór at siga seg frá sum formann á fundinum í leiðsluni í Vinstraflokkinum – og hesi tíðindi vóru søgd í fremstu donsku miðlunum, sum um hetta var ein staðfestur veruleiki. Søgan ferðaðist víðari frá redaktión til redaktión og DR og Berlingarin stjólu søguna og fortaldu hana sum var søgan teirra - júst sum KVF ger ferð eftir ferð. Søgan livdi allan dagin og eisini føroyska barnið hjá DR bar søguna – sum álítandi. Søgan bleiv bygd upp gjøgnum dagin við "álítandi keldum" og "persónum nær Løkke" – alt bara heit luft frá redaktiónsfundum uttan nakra ítøkiliga keldu.
Tá so Løkke fyrst undan leiðslufundinum avsannaði at hann hevði nakrar ætlanir at leggja frá sær og leiðslan í Vinstra gav honum fullan uppbakking – hava størstu miðlarnir, sum lótu seg fanga av eini søgu í Ekstrablaðnum, tosað um eitt COME BACK???
Eftirmetingarnar av søguni eru longu byrjaðar – men eftir stendur at fremstu og sterkastu donsku miðlahúsini lótu seg ríva við av einari ódokumenteraðari søgu – har leita var við lykt eftir øðrum søgum og útsagnum, sum kundi undirbyggja tað sum redaktiónirnar í donsku miðlahúsunum – hildu og mettu verða veruleikin.
Í dag kunnu miðlarnir so velja ímillum at dekka egnar feilir, fara aftur til søguna um vánaliga valúrslitið hjá Vinstra ella skriva um Lars Løkke sum "Comeback kid" - alt søgur um miðlar og ikki verulig tíðindi.
- Ella kanska er tað júst soleiðis stóru miðlahúsini arbeiða - er tað søgan og ikki fakta sum hevur týdning??
BERLINGARIN:
»Løkke er en gudsbenådet fighter«
DR:
Kommentator om Løkke: Største comeback siden Lazarus steg op fra de døde
TV2:
Historisk drama sluttede af med en krammer
Oso.fr

Nordlysid.fo

---

**3.000 ferðafólk gera innrás í Havn**
04-06-2014 09:18:52
Nú klokkan hálvgum tíggju leggjast stívliga 3.000 fólk afturat fólkatalinum í Havn í einum høggi.
Tí tá leggur stóra ferðafólkaskipið Celebrity Infinity at við molan í Havn.
Við skipinum, sum kemur higar úr Norra, eru 2067 ferðafólk og manningin telur 961 fólk, upplýsir havnarskrivstovan í Havn fyri kringvarpinum.
Millum størstu ferðafólkaskip
Celebrity Infinity er millum størstu ferðafólkaskipini, sum koma til Føroya um summarið. Skipið er 294 metrar langt.
Ferðafólkini eru úr nógvum londum, tey flestu úr Stóra Bretlandi, USA, Hong Kong og Kanada. Tey gera útferðir, meðan skipið liggur á Havnini.
Celebrity Infinity, sum er skrásett á Malta, fer av stað aftur klokkan seks í kvøld.
© Sandportal - Sandoyarportalurin

---

Árni Joensen 04.06.2014 (09:40)
**25 ár síðani blóðbaðið í Beijing**
Kinesisku myndugleikarnir hava hert trygdartiltøkiuni á Himmalska Friðartorginum í Bejing munandi, nú 25 ár eru liðin, síðani fleiri túsund mótmælisfólk doyðu undir einum álopi frá herinum.
Teir seinastu dagarnar hava nøkur minni mótmæistiltøk verið á torginum, men myndugleikarnir hava verið skjótir at spjaða tey mótmælandi, og nøkur teirra vórðu tikin.
Tað vóru yvirhøvur studentar, sum tóku lut í mótmælistiltøkunum í mai í 1989, har teir kravdu demokratiskar nýskipanir og størri politiskt frælsi. Í meiri enn ein mánað hildu mótmælini fram, og tann 3. juni mistu myndugleikarnir tolið og sendi alvápnaðar hermenn við stríðsvognum ímóti teimum mótmælandi.
Dagin eftir var torgið oyðið, men hvussu mong høvdu latið lív har og aðrastaðni í býnum, veit eingin við vissu. Metingar siga, at talið var millum 2.000 og 3.000.
Tær seinastu vikurnar hevur kinesiska løgreglan tikið fleiri tíðindafólk, løgfrøðingar og onnur. Sambært Amnesty International er talan um 66 fólk. Samstundis hava myndugleikarnir hert eftirlitið við fjølmiðlunum, eins og teir hava sett ymsar avmarkingar í verk á alnótini.
In.fo

---

Barbara Holm 04.06.2014 (11:03)
**Reimund: Eg broyti ikki meining**
- Eg havi ikki broytt meining, og komi heldur ikki til at gera tað. Jørgen Niclasen noyðist frá, sigur Reimund Langgaard í dag.
Reimund Langgaard úr Sambandsflokkinum var ein teirra, sum atkvøddi fyri uppskotinum um misálit á Jørgen Niclasen, landsstýrismann, í farnu viku.
Hóast misálitsuppskotið fall, so hevur atkvøðugreiðslan elvt til mikið rumbul í samgonguni, tí flokkarnir eru ójavnir á máli um framtíðina hjá Jørgeni Niclasen sum fíggjarmálaráðharra.
Jørgen Niclasen segði í gjár fleiri ferðir við útvarpið hjá Kringvarpinum, at hann hevur fullan stuðul sum formaður og sum fíggjarmálaráðharri í sínum egna flokki, og tí kann tað tykjast sum, at hann ikki ætlar sær at leggja frá sær, tá ið freistin hjá løgmanni er úti, um 12 dagar.
Reimund Langgaard úr Sambandsflokkinum atkvøddi saman við partamanninum Helga Abrahamsen og formanninum í Miðflokkinum, Jenisi av Rana, fyri misálitisuppskotinum á Jørgen Niclasen, og báðir sambandstingmenninir søgdu aftaná atkvøðugreiðsluna, at teir fóru at heita á løgmann, um at loysa landsstýrismannin úr starvi.

- Eg fari ikki at broyta meining í hesum máli. Jørgen Niclasen noyðist at fara frá sum fíggjarmálaráðharri, um tú spyrt meg, sigur Reimund í viðmerking í dag.
Hann vil ikki gera aðrar viðmerkingar til máli.
In.fo

---

Áki Bertholdsen 04.06.2014 (14:30)
**Byggja nógv færri sethús**
Talið á sethúsum, sum verða bygd í Føroyum, er nógv fallið seinastu árini.
Tað staðfesti Arbeiðsgevarafelagið á aðalfundinum í felagnum nú ein dagin.
Í Føroyum er einki fullfíggjað yvirlit yvir sethúsabygging í Føroyum, so frægasta yvirlitið er at hyggja eftir, hvussu nógv hús binda í elnetið hjá SEV um árið.
Og tey tølini vísa, at frá 200 til 2006 lá talið á nýbygdum sethúsum rættuliga støðugt á 250-260 húsum um árið.
Árini 2007 og 2008 vaks talið av nýbygdum sethúsum, men síðani hevur minking verið í talinum á hvørjum ári.
Og í fjør var talið á nýbygdum sethúsum tað lægsta síðani aldarskiftið.
Samstundis kann staðfestast, at seinastu tvey árini eru góð 70 prosent av nýbygdu sethúsunum bygd í Streymoynni.
Tað kunnu vera nógvar orsøkir til fallið. Ein orsøk kann vera, at tað er bygt so nógv seinastu árini, at marknaðurin hevur verið mettaður í hvussu so er við teimum fíggingarmøguleikum og prísum, sum eru.
Ein onnur orsøk kann vera, at nógvastaðni hevur tað verið hopleyst at fáa grundstykki, men ein triðja orsøk kann eisini vera, at fólk hava ikki rættiligt havt álit á framtíðina og tískil ikki hava torað at seta seg í stóra skuld.
Talvan vísir, hvussu nógv hús eru bygd í Føroyum síðani aldarsskiftið. Yvirlitið er bygt upp í sethús og annað, sum eru neyst, fjós, seyðhús, úthús, hjallar o.s.fr.
In.fo

---

Barbara Holm 04.06.2014 (19:08)
**Tollmálið: Sakarmálið tekur minst eitt ár**
Um samgongan velur at bíða eftir einum úrskurði frá dómsvaldinum í samband við tollmálið, so skal Føroya fólk vænta at bíða í minsta lagið í eitt ár, áðrenn avgerð fellur.
Tað sigur Bjørn á Heygum, sakførari, í kvøld.
Røddir eru í kvøld frammi um, at avgerðin hjá Jørgeni Niclasen at leggja sak móti Kringvarpinum og Portalinum júst nú, er mest ein politisk roynd at bjarga sær sessin sum fíggjarmálaráðharri.
Fólkaflokkurin fekk mánadagin 14 dagar frá løgmanni at loysa trupulleikan, sum kom í kjalarvørrinum av tollmálinum, og misálitisuppskotið á Jørgen Niclasen í farnu viku.
Lítið bendir á, at Jørgen Niclasen ætlar sær at leggja frá sær sum fíggjarmálaráðharri, og hann hevur fleiri ferðir ført fram, at hann hevur fullan stuðul frá Fólkaflokkinum sum formaður og sum fíggjarmálaráðharri.
Í kvøld hevur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum so valt at stevna Kringvarpinum og Portalinum millum annað við hesi grundgeving:
"Eg kann ikki longur góðtaka, at nevndu fjølmiðlar hava sett eina útspillingarherferð í gongd móti mær, einans við tí endamáli at oyðileggja mína politisku framtíð.
Skuldsetingarnar móti mær um at hava snýtt í tolli eru ósannar. Talan er um grova ærumeiðing móti mínum persóni. Skuldsetingarnar verða eisini settar fram móti betri vitan."
Fleiri keldur hjá in.fo í Sambandsflokkinum siga í kvøld, at hendan avgerðin hjá Jørgeni Niclasen um at stevna ikki er nóg mikið til, at sambandstingfólk broyta hugsan í málinum.
Løgmaður vildi ikki gera stórvegis viðmerkingar til málið í kvøld, men er eftir øllum at døma fegin um nýggjastu tíðindini frá Fólkaflokkinum.

– Hetta er í øllum førum eitt stig rætta vegin, sigur løgmaður í stuttari viðmerking.
Um avgerðin hjá Jørgen Niclasen at stevna Kringvarpinum og Portalinum fyri bakbit verður nóg mikið til at kyrra Sambandsflokkin er ikki vist enn.
Í øllum førum er greitt, at ein slík sak er tíðarkrevjandi.
– Hatta sakarmálið tekur í øllum førum eitt ár, sigur Bjørn á Heygum, sakførari.
In.fo

---

**Fiskivinnan má røkja føroysk áhugamál**
Tíðin er komin, at avgerðir verða tiknar um framtíðar fiskivinnuna í Føroyum.
Óvissan økist fyri hvønn dag, sum vit nærkast 1. januar 2018, tá verandi loyvi ganga út.
Vit eiga at innrætta fiskivinnuna, so hon røkir føroysk áhugamál og fremur búskaparvøkstur og fólkavøkstur her á landi.
Rakstarróp um uppboðssølu av fiskirættindum hava leingi verið frammi í miðlunum, har vinstravongurin við Sosialinum, Kringvarpinum, Tjóðveldi og Javnaðarflokkinum draga somu línu.
Vanlig hugsandi fólk síggja klárari fyri hvønn dag, at hesi rakstrarróp um uppboðssølu eru tóm og skilaleys í praksis.
Ein uppboðssøla hevði avhent okkara fiskatilfeingi til útlendskar kapitalsterkar fyritøkur, sum høvdu fiskað við útlendskum skipum og avreitt í útlendskum havnum. Hetta fremur ikki virðisøking í Føroyum, men hevði heldur tikið støðið undan føroysku vinnuni.
Uppboðssøla hevur verið roynd í Kili, Ruslandi og Estlandi, har hon sambært granskarum er miseydnað og slept.
Á Falklandsoyggjunum og í Namibia hava tey roynt at selt útlendingum fiskirættindini, og er úrslitið at útlendingarnir hava ongan áhuga í stovnsrøkt og heldur ikki í at gera íløgur á landi og enn minni í nýggjar avleiddar vinnur.
Vit eiga at menna føroysku fiskivinnuna og leggja nýggjar tryggar karmar fyri hana, soleiðis at hon heldur á at styrkja vinnuna á landi, búskapin og samfelagið.
Um ynski er at krevja inn pening fyri tilfeingið, so er hetta møguligt við eini einfaldari skipan, har kilogjald verður ásett eftir parti av ársúrslitinum í ymsu veiðibólkunum.
Treytin fyri einum gjaldi skuldi verið, at vinnan fekk tryggar karmar við umsetiligheit, stabiliteti, tryggum brúksrætti og frælsi at laga veiðitólini til tørvin.
Ein einfaldur leistur fyri kilogjald hevði givið vinnuni kendar karmar, sum vóru lættir at rokna inn í framtíðar planlegging og íløguætlanir.
Í verandi støðu eru ótryggleikarnir so stórir, at fleiri halda sær aftur við at seta gongd á nýtt virksemi og gera íløgur í vinnuna.
Hendan naggatødn er skaðilig fyri framburðin. Hóttanir um uppboðssølu, sum tekur alt avlop úr vinnuni, eru eisini skaðiligar.
Vónandi kann sitandi samgonga skipað fiskivinnununa av nýggjum, so hetta álvarsmál ikki verður givið upp til skutil.
Jógvan Poulsen, formaður í Havnar Framburðsfelag
Vp.fo

---

**Løgmaður noyðist helst at taka avgerð um Jørgen**
04.06.2014 - 13:11
Jørgen Niclasen sigur, at hann hevur fulla undirtøku í Fólkaflokkinum
Alt bendir á, at løgmaður sleppur ikki undan at taka støðu til, hvat skal henda við landsstýrissessinum hjá Jørgen Niclasen, formanni í Fólkaflokkinum og landsstýrismanni í fíggjarmálum.
Jørgen Niclasen, sum seinnapartin í gjár var á fundi við landsstýris- og løgtingsmanningina hjá flokkinum, sigur seg hava fullan stuðul frá teimum.
Í kvøld kl 18 er floksleiðslan hjá Fólkaflokkinum boðsend á fund í flokshølunum í Havn. Floksleiðslan er umboð fyri lokalfeløgini, landsstýrisfólk og tingfólk hjá flokkinum.

Kvf.fo

---

**Heini andmælingur á ráðstevnu um mannarættindi**
04.06.2014 - 15:43
Fleiri enn hundrað granskarar vera við á ráðstevnuni í Istanbul
Heini í Skorini verður andmælingur/opponentur á stórari mannarættindaráðstevnu í Istanbul seinni í hesum mánaðinum.
Tað skrivar Fróðskaparsetrið.
Ráðstevnan verður í turkiska býnum, og heimsumfatandi fakfelagsskapurin fyri gransking í altjóða politikki, International Studies Association, skipar fyri.
**Nógvir granskarar við**
Fleiri enn hundrað granskarar úr øllum heiminum verða við, og Heini verður við sum partur av einum toymi av granskarum úr Evropa og USA, sum varð skipað á danskastovninum fyri mannarættindi í Keypmannahavn í fjør summar.
Heini í Skorini, sum er í holt við eina ph.d.-verkætlan á King's College London, og sum eisini hevur tillknýti til Fróðskaparsetrið, skal verður andmælingur/opponentur í tí eina panelinum. Hetta panelið fer at snúgva seg um, hvussu átrúnaður og átrúnaðarlig virði ávirka mannarættindapolitikk og altjóða lóggávu í ST
Kvf.fo

---

**Slitin elskipan orsøk til eldin í Klaksvík fyri viku síðani**
Leif Láadal
04.06.2014 - 12:11
Ein gomul og slitin elskipan var orsøkin til eldin í Klaksvíkar sleipistøð fyri einari viku síðani. Tað er sambært Kringvarpinum niðurstøðan hjá Kanningardeildini hjá politinum.
Jón Klein Olsen, kanningarleiðari, sigur við Kvf, at kanningarnar hava staðfest, at orsøkin var el-innleggingin, sum var gomul og tí slitin. Tað gjørdi, at hon festi í.
Portal.fo

---

**Sea Shepherd bjóðar 500 fólkum til Føroya at halda feriu við meining**
Leif Láadal
04.06.2014 - 11:00
Sea Shepherd hevur áður boðað frá, at felagsskapurin fer at vera í Føroyum frá juni til september í ár. Men tað gongur eftir øllum at døma ikki so væl at fáa fólk við sær. Fleiri ferðir í seinastuni hevur felagsskapurin hjá Paul Watson lýst á sínum Facebook-síðum eftir fólki at koma við.
Sagt verður, at málið er at fáa 500 sjálvboðin við til Føroya, og hesi skulu so forða fyri, at føroyingar drepa ein einasta grindahval í summar.
FERIA VIÐ MEINING
Fyri at fáa fólk at tekna seg, verður sagt, at Føroyar eru fjarskotnar og vakrar oyggjar, har tey, sum fara, kunnu halda eina "feriu við meining".
Á enskum verður sagt soleiðis:
"Help us save some lives this summer and at the same time explore the beauty of the remote Faeroe Islands. It will be a vacation with meaning."
Portal.fo

---

**Hundurin legði á – 79 ára gamal etin livandi**

Snorri Brend
04.06.2014 - 09:56
ONGLAND: Tvær kvinnur vórðu í gjár dømdar í eitt ára fongsul, eftir at hava viðgingið at tær lótu hund teirra bíta ein 79 ára gamlan mann til deyða.
Sambært BBC eru tær báðar 29 og 30 ára gomlu kvinnurnar ákærdar eftir lógini um vandamiklar hundar (Dangerous Dog Act).
Dómarin, Mark Brown segði í rættinum, at deyðin hjá 79 ára gamla manninum var óneyðugur.
Hann legði dent á, at maðurin bókstaviliga varð "etin livandi", og at hann doyði undir "ræðuligum umstøðum".
SVØLTAÐU HUNDIN
Tað var í mai mánaði í fjør, at hin 79 ára gamli Clifford Clarke lat lív undir sera dramatiskum umstøðum.
Hann varð – snøgt sagt – etin livandi av einum hundi, sum ikki hevði fingið bitan í samfullar 45 tímar.
Hundurin legði á Clarke, tá hesin lat bakhurð sín upp, tí hann ætlaði at leggja mat út.
Báðar kvinnurnar játtaðu í rættinum, at tær lótu hundin ganga leysan í privatum øki.
Grannar høvdu sæð hundin – sum var ein blandingur av rasunum Presa Canario og Bullmastiff, við skeggi kring kjaftin.
Ein granni segði haraftrat, at hann sá hundin tyggja armin á Clarke.
Ein annar granni segði, at hann hevði hoyrt hin 79 ára gamla mannin rópa og biðja hundin fara burtur frá sær. Hesin grannin leyp út í garðin, og sá tá hundin skræða armin av manninum.
Í rættinum vóru hesar ógvusligu detaljurnar lagdar fram um hundin, sum rætt og slætt hevði bitið seg fastan í armarnar á Clarke.
UTTAN VATN OG SKUGGA
Kvinnurnar báðar greiddu frá, at hundurin, sum tær róptu Charlie, hevði gingið uttan vatn og uttan skugga, tí tær skuldu avstað at grilla saman við vinfólkum.
Sambært dómaranum vóru tær hepnar ikki at verða ákærdar fyri óviljað manndráp.
Clarke doyði sum ein fylgja av álvarsomum skaðum og stórum blóðmissi.
Hundurin var so mikið aggresivur, at hann eisini glepsaði eftir einum løgreglumanni og pistól hansara.
Hesin føldi seg hóttan, og varð tí noyddur at skjóta tvey ávaringarskot-
Kvinnurnar játtaðu seg sekar í trimum førum at djórapínslu, og sleppa ikki aftur at hava kelidjór heima við hús.
Í farna mánaði vórðu strangari reglur sett fyri eigarar í Onglandi og Wales, hvør hundar leypa á fólk.
Kvinnurnar høvdu longu játtað seg sekar, áðrenn henda lógin kom í gildi, og tí var harðasta revsing teirra tvey ár í part.
Portal.fo

---

| Føroysk partabrøv | Last | +/- | % |
|---|---|---|---|
| Atlantic Airways (ICL) | 144,00 | 0,00 | 0,00 |
| Atlantic Airways (COP) | 206,00 | 0,00 | 0,00 |
| Atlantic Petroleum (ICL) | 145,00 | 0,00 | 0,00 |
| Atlantic Petroleum (COP) | 94,00 | 0,50 | 0,53 |
| Bakkafrost (OSL) | 99,98 | 0,00 | 0,00 |
| BankNordik (ICL) | 118,00 | 0,00 | 0,00 |
| BankNordik (COP) | 118,00 | 1,00 | 0,85 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Faroe Petroleum (LSE) | 11,93 | 0,11 | 0,97 |

Vmf.fo

---

**Andlát**
Marita Klein, Klaksvík, andaðist í heiminum,sunnukvøldið, 66 ára gomul.

---